*Martin Paldam, professari:*

# – Annað var ikki væntandi

*– Eg hevði ikki væntað annað útspæl frá donsku stjórnini enn hatta. Danmark hevur ongan vinning av Føroyum og teir vilja tí heldur ikki gjalda fyri at føroyingar gerast sjálvstøðugir. Føroyingar ynskja tað og eg ivist ikki í, at tað er rætt og eg ivist heldur ikki í, at føroyingar klára broytingina uttan stórvegis hóvasták, sigur Martin Paldam, professari*



*– Eg haldi ikki, at útspælið hjá Nyrup var so ógvusligt, og eg haldi framvegis, at føroyingar eiga at taka fullveldi. Tað er tað besta fyri báðar partar og avleiðingarnar vera ikki so ógvusligar, sigur Martin Paldam*

SVEINUR TRÓNDARSON

Hóast tað hjá nøkrum kanska kom sum eitt sjokk, tá Poul Nyrup Rasmussen langaði donsku treytirnar á borðið, so eru kortini ikki øll, sum eru eins bilsin.

Á Lærda háskúlanum í Århus situr ein maður, sum kennir nokkso væl til Føroyar og føroysk viðurskifti, og hann heldur ikki, at útspælið var ógvusligari enn væntað.

Martin Paldam, professari, sigur við Sosialin, at støðan í Danmark er soleiðis hátta, at danir eru troyttir av føroyingum, og at teir heldur enn fegnir vilja sleppa av við okkum.

– Tú skalt minnast til, at tað, seinastu árini, alsmant meira er kastað dønum fyri, at teir hava alla skuldina fyri tær ólukkur, sum føroyingum hevur verið fyri, og tað eru fólk deyðatroytt av. Føroyingar siga ikki so frægt sum takk fyri ta góðu milliardina, sum verður send hvørt ár, og tað ger bara ilt verri, sigur Martin Paldam.

### Ber væl til

Annars hoyrir Martin Paldam ikki upp í tann bólk av dønum, sum siga, at føroyingar ongan møguleika hava at klára seg uttan donsku ríkisveitingina. Tvørturímóti.

Hann er ivaleysur í, at tað ber til. Eisini innanfyri tey fimm árini, sum Poul Nyrup Rasmussen hevur lagt upp til.

– Føroyingar vita, at tað kemur eitt fall í livifótinum, men tað verður eingin orsøk at óttast fyri tí. Føroyar verða framhaldandi eitt ríkt land, og inntøkan fellur ikki ein gang so nógv, at Føroyar gerast eitt milluminntøkuland. Men hygg t. d. til Onglands, Spania og fleiri onnur lond í Evropa. Tey hava ikki hægri miðalinntøku enn tað, og tey klára seg sera væl. So har er einki at vera bangin fyri.

Harafturat er Paldam eisini ivaleysur í, at tað er rætt av føroyingum at taka fullveldi, tí tað ger greiðari linjur í øllum viðurskiftum.

– Sum støðan er nú, hava føroyingar búskaparligu stýringina, men hendir nakað, so eru tað danir, sum fáa skyldina og tað er nakað, sum troyttar fólk.

Paldam leggur afturat, at hann ikki hevur sæð føroyska útspælið, og tí ikki kann gera viðmerkingar til tað, sum í tí stendur, og somuleiðis hevur hann heldur ikki sæð útrokningarnar frá Fíggjarmálaráðnum danska, men báðir partar fáa nøkur orð við á vegnum.

– Eg haldi, at tað er skeivt av landsstýrinum at biðja um búskaparliga hjálp í eitt longri tíðarskeið, tí føroyingar hava ikki krav upp á nakað. Sum eg havi skilt, so biðja føroyingar um hjálp í nærum óavmarkaða tíð framyvir, og tað sigur seg sjálvt, at danir ikki vilja veita tað.

*Men teir hava avmarkað tíðarskeiðið til 15 ár, er tað ikki á eini góðari leið fyri búskapin?*

– Eg haldi ikki at tað er neyðugt við meiri enn fimm árum, sigur hann.

Martin Paldam sigur nevniliga, at støðan, sum hon er í dag er tann, at ríkisstuðulin, bæði í Føroyum og í Grønlandi, hevur skaðilig árin á búskapin.

– Samfelagsbúskapurin hevur ikki gott av, at so nógvir pengar vera sprændir inn í samfelagið, og tí er tað einasta rætta, at fáa stuðulin burtur, sum skjótast.

Hesum fær hann undirtøku fyri frá føroyskum búskaparfrøðingum og eisini formanninum í Ráðgevandi nevndini, Arna Larsen

### Heldur lítið um fíggjarmálaráðið

Annars heldur Martin Paldam lítið um mátan hjá Fíggjarmálaráðnum um at rokna føroyingar búsitandi í Danmark upp í ríkisstuðulin til Føroya.

– Uttan at eg havi sæð tølini, so loyvi eg mær at siga, at hatta hoyrir ongastaðni heima. Føroyingar í Danmark eru ikki teir, sum liva av hjálp frá statinum, so hatta hoyrir ongastaðni heima.

Tá vit spyrja Martin Paldam um hann væntar, at roknistykkið frá Fíggjarmálaráðnum fer at hava við sær ein keðiligan samráðingaranda, sigur hann, at tað væntar hann ikki.

– Partarnir skulu røkka einum máli, og eg vænti, at teir fara at gera tað í felag, men tað verður neyvan við eini langari skiftistíð, sum úrslit.

Tá vit spyrja um hann heldur, at føroyingar eiga at taka fullveldi ella ikki, sigur hann púra greitt.

– Taki fullveldi. Fyri tykkara egnu skyld - so gera tit samstundis dønum eina tænastu.

# – Vit eru gíðslar í innanríkispolitikkinum

*Løgmaður er sera vónbrotin av dønum. – Stjórnin er líkaglað við okkara ynski um fult ræði á egnum viðurskiftum og teir vilja varðveita danskt yvirharradømi í Føroyum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Anfinn Kallsberg, løgmaður, er komin aftur til Føroya eftir fyrsta samráðingarfundin við danir, og er aftur til arbeiðis í Tinganesi. Og tað var ein sera vónbrotin løgmaður vit fingu orðið á.

– Eg eri sera vónbrotin av, at fyrsta umfarið av samráðingunum skuldi ganga soleiðis sum tað gjørdi, tí hatta var ikki tað, sum avtalan var frammanundan. Vit høvdu eina greiða avtalu við stjórnina um, at vit skuldu leggja uppleggið fyri teir og síðani skuldu vit avtalað gongdina framyvir. Kortini lat stjórnin upp-lýsingar um tøl leka út til pressuna, og tað hoyrir ongastaðni heima, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur, at tað var ein sera keðiligur andi yvir samráðingunum, tí tað var beinanvegin føroyingum greitt, at danir vóru fullkomiliga líkaglaðir við ynski føroyinga.

– Teir høvdu gjørt sína støðu upp frammanundan, og tí var einki at tosa um. Teir hava gjørt ríkisfelagsskapin til ein spurning um pengar og tað var ikki meiningin, sigur løgmaður.

Undir samráðingunum varð landsstýrið presenterað fyri eini útrokning, sum vísir, at føroyingar kosta dønum 1,9 milliard, og tá hava danir enntá roknað føroyingar búsitandi í Danmark við í uppgerðina.

– Men vit sluppu ongantíð at síggja hesa útrokningina, sigur Anfinn Kallsberg.

– Stjórnin spældi út við, at vilja vit vera verandi undir donskum harradømi, so kundu vit halda fram, sum nú, men halda vit fram í ríkisfelagsskapinum, so kunnu vit bara fara, og tað haldi eg er ótrúliga fýrakantað.

Løgmaður vísir á, at danski forsætisráðharrin javnan hevur tosað um »gensidig respekt«, men at henda virðing ikki var til at fáa eygað á fríggjadagin.

– Tað gjørdist okkum greitt beinanvegin, at vit gerast gíðslar í donskum innanríkispolitikki, og tí skal hann gevast við at tosa um »gensidig respekt«. Tí tað er bara ein táta, sigur ein vónbrotin løgmaður.

Anfinn Kallsberg sigur annars við Sosialin, at hann skilur ikki ta donsku støðuna. Danir eru annars kendir fyri, at vera teir fyrstu at geva londum hjálp til sjálvhjálp og tað, sum vit bóðu um var, at vit leggja broytingartíðina til rættis á ein skilagóðan hátt, men tað hevur víst seg, at tað vilja danir ikki.

Løgmaður leggur afturat, at tað ikki verður upp á tal, at fara at broyta uppleggið til at liggja nærri upp at teimum hjá andstøðuni, tí tað ber heilt einfalt ikki til.

Har verður tosað um tvey ymisk fyribrigdið - fólkarættarliga og statsrættarliga - og teimum er stóru munur á.

Hóast misskiljingarnar, so eydnaðist tað kortini landsstýrinum at fáa gjørt eina avtalu um framhaldandi samráðingar og tað verður við føroyska upplegginum, sum grundarlag.

– Tað var tað vit fóru eftir, so í so máta kunnu vit vera nøgd. men vit fingu nakað meir enn vit ætlaðu og sum ikki er dønum til sóma.

# – Teir mugu hava etið seym

*Óli Breckmann er í øðini inn á framferðina hjá donsku ríkisstjórnini, sum hann leggur undir at vera beinleiðis illviljaðar móti føroyingum*



*Óli Breckmann*

SVEINUR TRÓNDARSON

Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins, er sera vónbrotin av útspælinum hjá donsku stjórnini og hann er beinleiðis í øðini inn á framferðarháttin hjá Fíggjarmálaráðnum í sambandi við fundin í Keypmannahavn fríggjadagin.

– Teir hava brúkt eina lúsuta framferð móti landsstýrinum. Stjórnin brúkar uppskotið hjá Javnaðarflokkinum, sum jarnbrot at knúska føroyingarnar við, og tað líkist ongum, sigur Óli Breckmann.

Hann er skelkaður av framferðini hjá stjórnini, leggur Nyrup undir at hava tikið føroyingar sum gíðslar í donskum innanríkispolitikki.

– Hann hevur serstakliga vánalig úrslit at vísa á í veljarakanningunum og nú hevur hann lagt upp til strekkmarsj í spurninginum um evruna, sum danskt gjaldoyra. Hetta skulu føroyingar bløða fyri, tí hann vil ikki hava trupulleikar av okkum, men so lætt sleppur hann ikki, sigur Óli Breckmann.

### Andstøðan drigin upp á tráð

Óli er eisini rættuliga vónbrotin av støðuni, sum andstøðan í danska fólkatinginum hevur tikið í Føroyamálinum og hann leggur beinleiðis Nyrup undir at hava drigið donsku andstøðuna upp á tráð.

– Andstøðan hevur fingið at vita frá Nyrupi hvørji »ynski« føroyingar hava og tað er ikki so løgið, at teir taka undir við honum, tá teir hava fingið so skeivar upplýsingar, sigur Óli Breckmann.

Hann vísir á, at danir tosa um at 50 til 80 ár ganga áðrenn føroyska bruttotjóðarúrtøkan kemur upp á 2,5 mia. krónur, og tað heldur hann er fullkomiliga burtur úr vón og viti.

– Hugsi tykku! Fyrst í fimti árunum var føroyska fíggjarlógin 9 - níggju - milliónir krónur. Nú er hon um tríggjar milliardir. Tað er meiri enn trý hundrað ferðir so nógv. Somuleiðis er føroyska bruttotjóðarúrtøkan vaksin, so at tosa um 50 til 80 ár er heilt burturvið. Tei mugu hava etið bláseym.

Tað finnast eingi tøl fyri BTÚ í fimtiárunum, men í 1962 var BTÚ 260 milliónir. Í dag er hon 7,4 milliardir og tað er talið í 1962 falda við 28,5.

### Konservativu fáa av at vita

Í fólkatinginum situr Óli í tingbólki við teimum konservativu. Í gjár var ein av teirra monnum siteraður fyri at siga, at teirra flokkur fór at kroysta føroyska bróðurflokkin til at skifta hugsan, men tað verður av ongum, sigur Óli.

– Vit fara á kunnandi fund við teir mikudagin, og har fáa teir greitt at vita frá okkum, hvat býr í uppskotinum og teir fáa av at vita, fyri at hava lurtað eftir »søguni« hjá Nyrup, sigur Óli Breckmann at enda.



*Jóannes Eidesgaard:*

# Fullveldisuppskotið skrædnaði

*Formaðurin í Javnaðarflokkinum gjørdist ikki sørt skakkur av harða útspælinum hjá donsku stjórnini, men hann staðfestir samstundis, at fullveldisuppskotið hjá landsstýrinum fekk eitt so hart skot fyri bógvin, at alt skrædnaði í einum*



*– Útspælið var harðari enn eg hevði væntað, men tað vísir, at føroyska útspælið var veruleikafjart og dreymakent, sigur Jóannes Eidesgaard*

SVEINUR TRÓNDARSON

Nú samgongan hevur verið í Danmark og lagt sítt samráðingarupplegg fyri stjórnina, sótu andstøðuflokkarnir báðir eftir heima í Føroyum og lurtaðu eftri tí sum fyrifórst í Keypmannahavn.

Og hóast Jóannes ikki er samdur við ætlanini hjá samgonguni, so var tað ikki søtur tónleikur, sum tónaði inn í oyruni á Jóannesi Eidesgaard, tá hann hoyrdi tað, sum forsætismálaráðharrin hevði at bjóða føroyingum.

– Fráboðanin hjá Nyrup um, at vit fáa eina búskaparliga skiftistíð upp á millum trý og fýra ár ger, at øll fullveldisætlanin hjá samgonguni skrædnaði í einum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann vísir á, at grundarlagið undir samráðingunum hjá landsstýrinum við donsku stjórnina er, at skiftistíðin skal verða 10 til 15 ár, men tað verður so av ongum og tað merkir, at grundarlagið er burtur.

– Samstundis segði Nyrup eisini, at øll rættindir, sum føroyingar hava í Danmark fella burtur, og samstundis skulu vit til at gjalda fyri tær tænastur, sum vit fáa í Danmark framyvir. Hatta eru knallharðar treytir, men samstundis realistiskar treytir, tí ætla vit at taka fullveldi, so kostar tað eisini, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Beinhart útspæl

Formaður Javnaðarfloksins er eitt sindur bilsin av útsøgnini hjá Nyrupi, men kortini sigur hann hana ikki vera so langt frá tí, sum formenninir í donsku andstøðuflokkunum hava sagt. Bæði Anders Fgh Rasmussen og Bendt Bendtsen hava sagt, at teir halda, at skiftistíðin skal ikki vera longri enn 5 ár og tað er tað, sum forsætisráðharrin hevur staðfest í dag.

– Hatta vísir tað, sum m. a. vit hava sagt frammanundan, at tað er gott samstarv millum andstøðu og samgongu í Danmark og tað vísir seg eisini, at teir hava somu fatan av málinum. Hetta samsvarar eisini við tað, sum ein donsk blaðkvinna, Nina Lauritsen segði við Sosialin fríggjadagin, at føroyingar skulu ikki vænta sær tað stóra. Hennara fatan er, at tað er eitt gott samstarv millum flokkarnar í Fólkatinginum og tað er tað, sum vit hava sæð í dag, sigur Jóannes.

Tað, sum Jóannes kortini hevur fest seg mest við í sambandi við fráboðan Nyrups er, at samgongan noktar at taka støðu til »tilboðið« frá stjórnini.

– Tað haldi eg verða serstakliga løgið. Eingin teirra vildi siga eitt orð um tað, sum stjórnin vil geva føroyingum, men tað er helst tí, at teir nú sita við einum ótrúliga stórum politiskum trupulleika. Tað er, at teir eru farnir til Danmarkar við einum dreymi – ella illusión – um, at teir kunnu fáa tað teir peika á. Tað vita tey nú, at tey ikki fáa, og tann trupulleikan misunni eg teimum als ikki, sigur Jóannes.

### Runnu undan

Jóannes Eidesgaard heldur, at føroyska sendinevndin kanska hevði stutt skotbrá til at svara upp á knøppu spurningarnar til knøppu útmeldingina, men hann heldur kortini, at teir hava gjørt ov nógv av at renna undan svarinum.

– Sjálvandi er tað torført upp á standandi fót, at svara upp á eitt slíkt upplegg, sum fer so langt frá eins egna uppleggið, men kortini haldi eg, at teir hava skyldu til at svara upp á tað. Men teir skulu ikki undir nøkrum umstøðum trúgva, at tey, tá tey koma aftur til lands, sleppa undan at svara,s igur Jóannes.

Og hann leggur afturat, at samgongan hevur fingið ein sera álvarsaman trupulleika, sum teir fáa ilt við at forklára seg burturúr.

– Hetta eiga føroyskir fjølmiðlar at leggja sær í geyma tá sendinevndin kemur aftur til Føroya. Hon eigur eisini at leggja seg eftir, at spyrja um tað er satt, at føroysku myndugleikarnir ætlaðu at myrkaleggja samráðingarnar, sum tíðindi ganga um í Danmark. Er tað satt, so er tað ótrúliga ódámligt.

– Tað er møguligt, at teir ætlaðu sær at kvala kjakaið áðrenn tað kom í gongd, men tað er miseydnast, sigur Jóannes.

### Kjakið verður meira beinrakið

Støðan í dag er eitt sindur øðrvísi enn hon var fyri bara heilt fáum døgum síðani, heldur Jóannes. Nú sendinevndin kemur heimaftur – at kalla – ongul í reyv, hevur kjakið í Føroyum kortini fingið eitt meira málrættað innihald.

– Áðrenn hava vit so at siga bara kjakast út frá upplegggum hjá flokkunum, uttan greitt at vita, hvat tað er, sum stjórnin vil ganga við til. Tað vita vit nú, og tað fer at hava við sær, at kjakið kann snarast meira beint inn á tað, sum tað snýr seg um, og tað er, at tað kostar pening, um vit ætla okkum at taka fullveldið, sigur Jóannes.

Hansara fatan er, at føroyingar ikki hava yvirtikið tað, sum vit eiga í nøkrum málum, sum nú eru undir føroyskari umsiting. Hann nevnir almannamál, skúlamál og heilsumál og sigur, at hesi eru føroysk men peningurin er danskur.

– Og nú hava vit fingið staðfest, at tá vit yvirtaka tey – við fullveldinum – so kostar tað eisini í krónum og oyrum í ríkisveitinigini. Hatta er bara ein náttúrlig avleiðing, sum ikki øll hava staðfest, men sum nú er sligin rimmarføst við tíggjutummaseymi, sigur Jóannes.

– Tjóðveldismenn fara kanska at royna at halda fast við, at tað sum Nyrup segði var fýrakantað, men tað er í veruleikanum Tjóðveldisflokkurin, sum nú hevur fingið ein sera stóran trupulleika, tí hann hevur rent seg so rimmarfastan. Fólkaflokkurin harafturímóti hevur fingið tey boðini teir leitaðu eftir, og tað var, at tað kostar ov nógv at taka fullveldið, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Og so kann Óli Breckmann, sum ikki hevur verið so heitur talsmaður fyri fullveldinum siga hvat hann vil í útvarpinum.

### Tað fer at síggjast aftur

Niðurstøðan hjá Jóannesi er, at nú fráboðanin um hvar danska stjórnin stendur er komin, áttu vit at fingið búskaparfrøðingar at roknað út, hvat tað kemur at kosta um skiftistíðin bert verður trý til fýra ár.

– Hon hevði við vissu víst, at tað av álvara fer at síggjast aftur á føroysku vælferðini og tað trúgvi eg ikki, at fullveldisætlanin tolir. Í hvussu er hevði ein veljarakanning gjørd í dag verið nógv meira ímóti fullveldisuppskotinum enn tann sum Sosialurin og SvF vísti.

Hann vísir á, at ein búskaparlig skiftistíð upp á trý til fýra ár, eftir hansara fatan hevði havt við sær, at blokkurin og restpeningurin til danskar stovnar í Føroyum, íalt 1,3 millión hevði havt við sær, at stuðulin hevði minkað við 325 milliónum um árið, og tí hevði yvirskotið á fíggjarlógini verið burtur. Og tað trúgvi eg ikki fólk taka undir við, sigur Jóannes at enda.

# Uttanlandsnevndin fær frágreiðing í dag

*Heðin Mortensen útilokar ikki, at hann bakkar upp um samgonguna, um so er, at stjórnin er farin órættvíst fram á fundinum fríggjadagin*

SVEINUR TRÓNDARSON

Sunnudagin heitti Heðin Mortensen á formannin í Uttanlandsnevndini um at kalla løgmann til fundar soleiðis, at nevndin kann fáa eina frágreiðing um støðuna í samráðingum við danir.

Hann vil fegin hava eina frágreiðing frá løgmanni um samráðingarnar og serliga nú samráðingaruppleggið verður almannakunngjørt í dag.

Samráðingarnar gjørdust helst øðrvísi enn nakar føroyingur hevði væntað, og tað er ymiskt, sum bendir á, at danir ikki hava víst seg frá síni bestu síðu.

– Ta frágreiðingina vil eg hava frá løgmanni sjálvum, sigur Heðin.

*Kann tað hugsast, at tú bakkar landsstýrið upp, um so er, at teir eru órættvíst viðfarnir, hóast tað er ímóti tykkara fatan í Sambandsflokkinum?*

– Nú vil eg fyrst hoyra frágreiðingina frá løgmanni sjálvum, men tað sigur seg sjálvt, at fer stjórnin skeivt fram, so fær landsstýrið mín uppbakning. Í hesum føri eru vit fyrst og fremst føroyingar, so má hitt koma í aðru røð, sigur Heðin Mortensen.

Løgmaður sigur við Sosialin, at nevndin fær fulla frágreiðing um tað, sum er farið fram, og at øll skjøl - hvørt og eitt - sum er komið fram undir samráðingunum, verður lagt á borðið. Síðani verður tað almannakunngjørt.

Snikkaravirkið í Grønlandið

Sv




Vindeygu til summarið?
Bíleggið tey nú!

Vit gera:
• Øll sløg av vindeygum, úthurðum, trappum og listum
• Eisini allar seruppgávur og heildarloysnir

Tað føroyska Top Turn vindeygað

KUNNU VENDAST 180º UTTAN AT NAKAÐ AV RAMMUNI KEMUR INN Í RÚMIÐ

Vit geva fegin tilboð

Jóannes Paturssonargøta 34
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 47 77 • Fax 31 44 16 • Fartel. 21 36 73